# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BJARTARI TÍÐIR FYRI UNGAN FLOKK

So hendi tað, sum hevur verið væntandi eina tíð, at Jóannes Eidesgaard legði frá sær sum formaður í Javnaðarflokkinum. Tá boðað varð til tíðindafundar seinnapartin fríggjadagin, var beinanvegin gitt, at nú for formaðurin at leggja frá sær.

Veljarakanningarnar hava ikki verið mjúkar við Javnaðarflokkin alt hetta valskeiðið, og sambært teimum, so stendur illa til hjá Javnaðarflokkinum. Men hetta kann nú broytast. Ikki tí at Jóannes Eidesgaard skal persónifiserast við afturgongdina hjá flokkinum, men hatta var eitt taktiskt smart trekk, sum flokkurin kann vinna uppá.

Eitt generatiónsskifti júst nú er væl timað. Eitt lítið ár er eftir av valskeiðnum, flokkurin tykist at vera í javnvág organisatoriskt – hóast orrustuna kring Gerhard Lognberg og alt tað høvuðbrýggj, sum hann eisini framyvir fer at volda flokkinum, tí hann tekur tekur sín egna persón fram um flokkin.

Vit hava nevnt tað fyrr á hesum stað, at útgangspunktið hjá Javnaðarflokkinum fyri at fáa eitt rímuligt úrslit til komandi val er nógv betri enn hjá eitt nú Fólkaflokkinum, sum hevur stórar organisatoriskar trupulleikar – serliga nú Poul Michelsen fór úr flokkinum og hildið verður, at hann arbeiðir við at stovna ein nýggjan borgarligan fullveldisflokk, sum skal taka fullveldissinnað fólkafloksfólk og borgarlig tjóðveldisfólk.

Sambandsflokkurin hevur vunnið upp á at standa rimmarfastur um ríkisfelagsskapin og ynski um føroyskan ES limaskap. Javnaðarflokkurin hevur verið heldur ógreiður um ríkisrættarligu støðuna – hóast kjarnuveljarin ynskir, at floksins politikkur í nógv størri mun verður grundaður á eitt samfelag, har tað snýr seg um at tryggja øllum vælferð, heldur enn dreymar um at ráða í egnum húsi – kosta hvat tað kosta vil.

Tað er ein sera royndur politikari, sum nú leggur frá sær. Jóannes Eidesgaard kom á ting, tá Javnaðarflokkurin vann stórsigur í 1990. Hann var landsstýrismaður, tá bæði arbeiðsloysisskipanin og samhaldsfasti vórðu sett á stovn. Hann var eisini landsstýr-



ismaður, tá bæði Sjóvinnubankin og Føroya Banki vórðu loftaðir. Jóannes Eidesgaard var tann, sum skuldi lyfta Javnaðarflokkin uppaftur eftir stóra tapið í 1994, tá flokkurin misti helmingin av tingmanningini. Tað gekk næstan, men Javnaðarflokkurin tapti, tá tað eydnaðist nýggja Tjóðveldisflokkinum í 1998 at fáa føroyskan politikk at snúgva seg um ríkisrættarligu støðuna.

Tað slagið er helst tapt. Eydnast tað nýggju leiðsluni í Javnaðarflokkin at fáa politikk at snúgva seg um grundvirðini hjá javnaðarrørsluni, so hevur flokkurin helst eina bjartari framtíð, enn hana, sum allar veljarakanningarnar hetta valskeiðið hava spátt.

**Eitt væl timað generatiónsskifti í Javnaðarflokinum**

## Nýtt ættarlið fram at í Javnaðarflokkinum



**Áki Bertholdsen**

Tá ið Jóannes Eidesgaard í dag leggur frá sær sum landsstýrismaður í Javnaðarflokkinum, er tað fyrsta stigið til eitt rættiligt ættarliðsskifti í flokkinum.

Samstundis sum hann leggur frá sær sum landsstýrismaður, boðar hann frá, at hann eisini leggur frá, at tá ið landsfundur verður í næstum, leggur hann eisini frá sær sum floksformaður og at hann heldur ikki stillar upp aftur á næsta løgtingsvali.

Frammaundan hava bæði Katrin Dahl Jakobsen og Andreas Petersen boðað frá, at tey stilla ikki upp aftur á næsta løgtingsvali.

Sostatt verða tríggir javnaðarmenn í eldra endanum ikki at síggja í tinginum eftir næsta val.

Men tá ið Jóannes Eidesgaard heldur óvæntað boðaði frá síni avgerð fríggjakvøldið, helt hann eisini, at nú var stundin komin til at lata næsta ættarlið sleppa framat.

Hann helt eisini, at hetta er akkurát tann lagaliga løtan at gera tað, tí tað er góður politiskur friður nú.

Samstundis heldur hann tað vera neyðugt at hava eitt sjónligt ættarliðsskifti í flokkinum og at ein nýggjur formaður eigur at fáa stundir til at stinga sína kós fyri flokkin út í kortið, áðrenn løgtingsval verður aftur.

Samstundis sum Jóannes Eidesgaard leggur frá sær, er greitt, at Aksel V. Johannesen, sum er landsstýrismaður í heilsumálum, skal flyta yvir í fíggjarmálaráðið og taka við sum landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hinvegin verður John Johannessen nýggjur landsstýrismaður í heilsumálum.



**Órættvíst endurgjald til tingfólk**

BERGUR A. DALSGARÐ
KJAK Á SÍÐU 13



**Tollut skriving um týskarar**

JÚSTINUS EIDESGAARD
KJAK Á SÍÐU 13



## Aksel besta boðið

**Áki Bertholdsen**

Tað hevur elvt til nógvar gitingar um, hvør verður nýggjur floksformaður í Javnaðarflokkinum.

Men tað, at Aksel V. Johannesen nú verður »uppstigaður« til at verða landsstýrismaður í fíggjarmálum, verður tikið sum greitt tekin um, at Javnaðarflokkurin vil føra hann fram til at standa á odda fyri flokkinum tey næstu árini.

Somu áskoðan hava fimm av sjey javnaðarfeløgunum í landinum, sum Kringvarpið hevur verið í samband við, og tey vænta, at teirra felag fer at vísa á Aksel V. Johannesen, tá ið formansval verður í Javnaðarflokkinum um góðar 14 dagar.

**Sosialurin**
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*